Henrik Old **nr. 13/2020**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur viðvíkjandi Bank Nordik, settur landsstýrismanninum við fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu stórt vinningsbýti hevur landskassin fingið úr BankNordik samanlagt síðan 2010?

2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at selja almenna ognarlutin í BankNordik, og um so er nær?

Viðmerkingar
Samgongan hevur gjørt greitt, at tað liggur frammarlaga í ætlanunum at einskilja almenn partafeløg. Í hesum sambandi hevur talan m.a. verið um at selja almenna ognarlutin í BankNordik. Um støða skal takast til, um hetta er skilagott, er neyðugt við upplýsingum um, hvussu stórt vinningsbýtið úr felagnum hevur verið seinastu árini. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 8. september 2020

Henrik Old